# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 2. november 2017
Mál nr.: 16/00008-3
Málsviðgjørt: HKV

**Løgtingsmál nr. XX/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn** (Pensjónsnýskipan)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

(Pensjónsnýskipan)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 153 frá 23. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 1 verður 2. pkt. orðað soleiðis:
”Fyri persónar og arbeiðsgevarar er ásetti prosentparturin
   1) 2,50% frá 1. juli 2018,
   2) 2,75% í 2019 og
   3) 3,00% í 2020 og fylgjandi ár.”

**2.** § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Persónar, sum hava nátt pensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir rinda onki í grunnin. Arbeiðsgevarar, sum hava nátt pensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir og hava fólk í vinnu, rinda tó av útgoldnum A-inntøkum. Arbeiðsgevarar rinda ikki gjald fyri løn hjá útlendingum undir FAS-skipanini.”

**3.** Í § 2 verður sum stk. 7 sett:
“*Stk. 7.* Persónar, sum eru fevndir av Nordisk Konvention om Social Sikring, kunnu eftir umsókn verða frítiknir at rinda í grunnin. Umsóknin, sum skal latast TAKS, er galdandi frá móttøkudegnum at rokna.”

**4.** § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Rætt til arbeiðsmarknaðareftirløn eigur hvør persónur, ið hevur nátt pensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., um viðkomandi í minst trý ár at rokna frá 15 ára aldri og fram til

pensjónsaldur hevur havt fastan bústað í Føroyum og í sama tíðarskeiði hevur verið skrásettur í Fólkayvirlitinum í Føroyum. Bústaður í Danmark ella Grønlandi og skráseting í Fólkayvirlitinum har gevur sama rætt til útgjald, sum ásett í 1. pkt., um viðkomandi við útgjald býr í Føroyum."

**5.** § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Persónur hevur rætt til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt ár, viðkomandi lýkur krøvini í stk. 1, tó í mesta lagi 40 ár. Ár við frítøku eftir § 2, stk. 7 verða ikki tald við."

**6.** Í § 3, stk. 3 verður 1. Pkt. orðað soleiðis:
"Rætturin tekur við hin fyrsta í mánaðinum, ið viðkomandi hevur nátt pensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir."

**7.** Í § 3 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4.* Ásetingin í stk. 2 er ikki galdandi fyri persónar, sum búðu í Føroyum tann 1. juli 2009, so leingi hesir persónar búgva í Føroyum. 1. pkt. er treytað av, at móttakarin:
1) hevur nátt pensjónsaldur,
2) hevur havt bústað í Føroyum í minst 10 ár, tá arbeiðsmarknaðareftirlønin fer í útgjald, og
3) ikki hevur fingið játtað frítøku eftir § 2, stk. 7."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2018.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Uppskotið er ein partur av pensjónsnýskipanini, sum ætlanin er at seta í verk frá 1. januar 2020. Tó er tað soleiðis, at partar av broytingum koma í gildi áðrenn 2020. Hetta uppskotið kemur í gildi 1. juli 2018.

Mælt verður til, at hækka inngjaldið til Samhaldsfasta (Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin) komandi trý árini við 0,25% árliga.

Hartil verður í lógaruppskotinum mælt til, at dagføra reglurnar fyri, hvussu rættindi til útgjald verða forvunnin.

Eisini verður mælt til, at broyta reglurnar um pensjónsaldur, soleiðis at pensjónsaldurin í Samhaldsfasta – eisini frameftir – verður samsvarandi við almenna fólkapensjónsaldurin.

Herumframt verður mælt til eina broyting, sum fer at tryggja, at lógin um Samhaldsfasta verður í samsvari við Norðurlendska Sáttmálan um Sosiala Trygging. Harvið kunnu persónar, ið uppfylla ávís krøv, søkja um undantak fyri inngjaldi til Samhaldsfasta, og missa samstundis samsvarandi rætt til útgjald úr Samhaldsfasta.

Eisini verður mælt til eina skiftisreglu fyri tey, sum (helst ótilætlað) mistu rættindi av eini lógarbroyting í 2009.

Uppskotið er, sum sagt, partur av pensjónsnýskipanini og er so statt eitt í eini røð av lógaruppskotum, sum fara at broyta og betra um pensjónsskipanina.

**Um pensjónsnýskipanina**
Høvuðsendamálini við pensjónsnýskipanini eru:

*1. At tryggja øllum eina góða pensjón*
Øll tey, ið hava lítla ella onga inntøku framíhjá, fara at fáa meira at liva av. Eisini verður møguleiki fyri at fáa framskundaða pensjón, soleiðis at tey, ið eru kropsliga ella sálarliga slitin av arbeiðsávum, kunnu fara frá, áðrenn tey náa fólkapensjónsaldur. Eisini verður sett í verk sjávvirkandi árlig javning av almannapensjónum og øðrum almennum veitingum frameftir.

*2. At eggja fólki at arbeiða eftir pensjónsaldur*
Tey, ið ynskja at arbeiða eftir pensjónsaldur fara at kunna velja at útseta fólkapensjónina, og afturfyri fáa hægri pensjónsútgjald, tá farið verður á pensjón. Eisini lækkar mótrokningarprosentið í viðbótini úr 60% niður í 40%, samstundis sum mótrokning millum hjún verður strikað.

*3. At styrkja búskaparliga haldførið*
Pensjónsaldurin hækkar ½ ár í 2025 og síðan aftur ½ ár í 2030. Síðan verður sett í verk ein skipan, har pensjónsaldurin verður treytaður av gongdini í miðal lívsævi hjá fólki, ið hava nátt fólkapensjónsaldur. Almannapensjónin verður í størri mun lagað til aðra inntøku, og land og

kommunur fáa fleiri skattainntøkur so hvørt talið av pensjónistum hækkar við tað at útgjaldið úr Samhaldsfasta hækkar og fleiri fara at fáa pensjónsviðbót, ið bæði verða skattað við útgjald.

Nærri kunning um samlaðu pensjónsnýskipanina er í hjálagda fylgiskrivi 2 "Trygg og varandi pensjónskipan".

## 1.2. Galdandi lóggáva

*Inngjald í Samhaldsfasta*
Núverandi inngjald er 2,25%. Gjaldið verður rindað bæði av persónum og arbeiðsgevarum. Persónar rinda árliga 2,25% av skattskyldugu inntøkuni, og arbeiðsgevarar rinda 2,25% av útgoldnum A-inntøkum.

Núverandi inngjald hevur við sær, at grunnurin rindar eitt útgjald á 4.025 kr. um mánaðin til hvønn pensjónist. Útgjaldið verður javnað árliga, og stýrið fyri grunnin hevur kunngjørt, at útgjaldið í 2018 verður 4.145 kr. um mánaðin.

*Pensjónsaldur í Samhaldsfasta*
Sambært galdandi lóg skal persónur verða fyltur 67 ár fyri at fáa útgjald úr grunninum. Tað vil siga, at pensjónsaldurin í Samhaldsfasta er tann sami sum fyri fólkapensjón.

*Rættur til útgjald úr Samhaldsfasta*
Rætturin til útgjald er tengdur at, hvussu longi ein hevur búð í Føroyum. Rætt til útgjald eigur hvør persónur, ið hevur fylt 67 ár, og sum í minst trý ár, meðan hann var millum 15 og 67 ára gamal, hevur havt fastan bústað í Føroyum.

Persónur, sum hevur búð í Føroyum í minst trý ár, hevur rætt til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt árið, hann hevur havt fastan bústað í Føroyum meðan hann var millum 15 og 67 ára gamal, tó í mesta lagi 40 ár.

*Norðurlendski sáttmálin um sosiala trygging og Samhaldsfasti*
Galdandi lóg hevur ikki ásetingar um undantak frá gjaldsskyldu fyri persónar, sum eru sosialt tryggjaðir uttanlands sambært Norðurlenska Sáttmálanum um Sosiala Trygging. Tó er tað soleiðis, at hesir persónar í dag hava rætt til at verða frítiknir um teir kunnu ávísa, at teir eru sosialt tryggjaðir í øðrum norðurlandi.

Í galdandi lóg eru heldur ongar ásetingar um, at persónar, ið gerast frítiknir, ikki forvinna rætt til útgjald úr Samhaldsfasta. Tað vil siga, at persónar sum í dag verða frítiknir frá at rinda til Samhaldsfasta framvegis forvinna rætt til útgjald, tí kravið er einans bústaður í Føroyum. Neyðugt er tí við ásetingum fyri at umganga, at persónar verða tvítryggjaðir.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppskotið er sum sagt partur av pensjónsnýskipanini, og inngongur sostatt í eina røð av uppskotum.

Endamálini við júst hesum uppskotinum eru:

- At tryggja, at serliga teir pensjónistar, við lítlari ella ongari inntøku framíhjá fólkapensjónina og Samhaldsfasta, skulu fáa meira at liva av.
- At tryggja, at øll tey, sum búgva í Føroyum, og sum hava rætt til fólkapensjón, hava samsvarandi rætt til útgjald úr Samhaldsfasta.
- At tryggja, at persónar, sum arbeiða uttanlands, kunnu velja at verða undantiknir at gjalda til Samhaldsfasta um teir eru sosialt tryggjaðir uttanlands. Hetta er sbrt. norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygging. Velja persónar ikki at gjalda til Samhaldsfasta missa teir rættin til samsvarandi útgjald úr Samhaldsfasta.
- At tryggja, at pensjónsaldurin í Samhaldsfasta altíð er í samsvari við fólkapensjónsaldurin.
- At tryggja, at tey sum búðu í Føroyum 1. juli 2009, og sum (helst ótilætlað) mistu rættin til fullan Samhaldsfasta fáa rættin aftur.

*Spara meiri upp í felag*
Sjálvt høvuðsendamálið við hesum uppskotinum er at tryggja eina meira samhaldsfasta pensjónsskipan frameftir, har meira verður spart upp í felags pensjónsskipanini Samhaldsfasta.

Sera umráðandi er í hesum sambandi at gera vart við samsvarandi broytingina í Eftirlønarlógini – sum eisini er partur av pensjónsnýskipanini – har verður mælt til at lækka bundna inngjaldið til egna pensjón úr 15% og niður í 12%. Harvið minkar lógartvungna inngjaldið við 3% til eginuppsparing, samstundis sum lógartvungna inngjaldið til felags uppsparingina hækkar við 0,75% (fyri bæði arbeiðstakara og arbeiðsgevara).

Hækkingin í Samhaldsfasta og lækkingin í bundna gjaldinum í Eftirlønarlógini skulu sostatt síggjast sum ein heild, har samhaldsfasti parturin av pensjónsskipanini verður øktur, og tann parturin, sum er eginuppsparing, verður minkaður. Hetta fer serliga at koma teimum til góðar, sum hava lága inntøku gjøgnum arbeiðslívið. Tí við Samhaldsfasta verður rindað inn í mun til inntøku, men øll fáa tað sama útgoldið sum pensjónistar. Við eginuppsparing rinda hægru inntøkurnar meira inn, men fáa eisini samsvarandi meira útgoldið, og hjá teimum, sum hava lága inntøku gjøgnum arbeiðslívið – ella eru uttanfyri arbeiðsmarknaðin stóran part av lívinum – munar eginuppsparing ikki stórvegis.

Uppskotið fer sostatt at minka um inntøkuójavnan millum framtíðar pensjónistar.

### 1.3.1. Hækking av inngjaldi og útgjaldi

Mælt verður til, at inngjaldið í Samhaldsfasta hækkar soleiðis:

- Frá 1. juli 2018: úr núverandi 2,25% og upp í 2,5%.
- Frá 1. januar 2019: úr 2,5% og upp í 2,75%.
- Frá 1. januar 2020: úr 2,75% og upp í 3%.

Mett verður, at hvør hækking fer at økja um mánaðarliga útgjaldið við umleið 400 kr. mánaðarliga. Tað vil siga, at mánaðarliga útgjaldið hækkar við samanlagt 1.200 kr. um mánaðin frá 2020. Harumframt kemur so tann árliga javningin á umleið 3%, sum vanliga er í útgjaldinum úr Samhaldsfasta. Roknað verður við, mánaðarliga útgjaldið úr Samhaldsfasta fer at verða sum víst niðanfyri.

| **Samhaldsfasti – inngjald og útgjald, 2017-2020** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | ***2017*** | ***Frá 1. Juli 2018*** | ***Frá 1. jan 2019*** | ***Frá 1. jan 2020*** |
| Inngjald | 2,25% | 2,50% | 2,75% | 3,00% |
| | | | | |
| Hækking í útgjald pr. mð. vegna javning (3%) | | 120 | 135 | 155 |
| Hækking í útgjald pr. mð. vegna økt inngjald | | 400 | 400 | 400 |
| **Útgjald pr. mð** | **4.025** | **4.545** | **5.080** | **5.635** |

**Viðm:** Tølini fyri 2018, 2019 og 2020 eru metingar.

Mett verður, at mánaðarliga útgjaldið kemur at hækka úr núverandi 4.025 kr. um mánaðin upp í 5.635 kr. um mánaðin í 2020. Tað vil siga, at mánaðarliga útgjaldið væntandi fer at økjast við góðum 1.600 kr. um mánaðin, harav 1.200 kr. stava frá hækkingini í inngjaldsprosentinum og góðar 400 kr. stava frá árligari javning.

### 1.3.2. Pensjónsaldur

Pensjónsaldurin í Samhaldsfasta er í dag 67 ár og sostatt tann sami sum fyri fólkapensjón. Mælt verður til, at hesir eisini verða eins frameftir. Skotið verður tí upp, at lógin verður broytt og orðað soleiðis, at pensjónsaldurin í Samhaldsfasta av sær sjálvum verður tann sami sum fyri fólkapensjón. Tað vil siga, at tað frameftir verður soleiðis, at tá fólkapensjónsaldurin broytist, so broytist pensjónsaldurin í Samhaldsfasta eisini, uttan at tað verður neyðugt at broyta lógina um Samhaldsfasta.

### 1.3.3. Rættur til útgjald

Sambært galdandi lóg verður rættur til útgjald úr Samhaldsfasta vunnin við at hava bústað í Føroyum. Við pensjónsaldur verður talt saman, hvussu nógv ár viðkomandi hevur búð í Føroyum síðan hann fylti 15 ár.

Er talan um samanlagt 40 ár ella meira, fær viðkomandi fult útgjald. Er áramáli minni enn 40 ár, fær viðkomandi niðursett gjald (brotpensjón). Hetta er 1/40 av fullum útgjaldi fyri hvørt ár viðkomandi hevur búð í Føroyum. Hevur viðkomandi búð her í 20 ár, verður talan um hálvt útgjald (20/40). Hevur viðkomandi búð 14 ár, verður talan um 14/40 o.s.fr. Tó kann ikki verða talan um minni brot enn 3/40. Kravið fyri yvirhøvur at fáa nakað úr samhaldsfasta er sostatt at viðkomandi hevur búð í Føroyum í minst 3 ár.

Nakað sama upptjeningarskipan er galdandi fyri fólkapensjón. Tó er munurin, at meðan upptjening av samhaldsfasta byggir á bústað í Føroyum, so verður fólkapensjón upptjent við bústað í danska ríkinum, tvs. bústað í Føroyum, Danmark og Grønlandi.

Núverandi áseting hevur við sær at fleiri persónur hava upptjent størri rætt (brot) í fólkapensjón enn í Samhaldsfasta. Er talan um persónar, sum eru føddir í Føroyum, men hava búð meira enn 12 ár í Danmark ella Grønlandi, so fáa teir í dag fulla fólkapensjón, men niðursett gjald úr Samhaldsfasta. Sama er galdandi fyri persónar, sum eru føddir í Danmark ella Grønlandi, men sum eru fluttir til Føroyar, eftir at teir gjørdust 26 ára gamlir.

Samhaldsfasti hevur seinastu árini ment seg til at verða ein rættiliga stór og týðandi veiting. Upprunaliga var inngjaldið einans 0,5% og útgjaldið var tí ikki av so stórum týdningi í mun til fólkapensjónina. Talan var meira um eitt ískoyti. Síðan eru inngjaldið og útgjaldið vaksin munandi og við nýskipanini verður mælt til at hækka inngjaldið upp í 3%. Hetta hevur við sær, at útgjaldið helst verður góðar 5.600 kr. um mánaðin frá 2020.

Samhaldsfasti er nú vorðin ein so týðandi partur av skipanini við alduspensjón, at hildið verður, at tað er rættast, at uppjeningin verður meira eins í báðum skipanunum. Skotið verður tí upp, at tað fyri persónar, ið búgva í Føroyum við pensjónsaldur, verður galdandi, at ár við bústað í Grønlandi og Danmark telja við í upptjeningini.

Gjørt verður vart við, at broytingin einans fevnir um pensjónistar, ið búgva í Føroyum. Fyri pensjónistar, ið búgva uttanlands, og sum hava rætt til útgjald úr Samhaldsfasta, telja árini í Grønlandi og Danmark ikki við, einans árini við bústað í Føroyum telja við.

*Skiftisregla verður gjørd fyri tey sum (helst ótilætlað) mistu rættindi av lógarbroyting í 2009*
Hendan lógin varð við løgtingsmáli 87/2008 broytt við virknaði frá 1. juli 2009.

Ein av broytingunum í uppskotinum var, at farið varð yvir til galdandi brotpensjón, har lægsti broturin, sum gav rætt til útgjald, var 3/40, meðan hægsti broturin var 40/40.

Endamálið við broytingini var, at tryggja, at ræturin til arbeiðsmarknaðareftirløn varð varðveittur, hóast móttakarin flutti í annað land at búgva.

Áðrenn løgtingslógin varð broytt í 2009, var útgjald bert treytað av, at móttakarin búði í Føroyum. Hevði móttakarin bústað í Føroyum, fekk hann fult útgjald við pensjónsaldur og so leingi, hann búði í Føroyum.

Løgtingslógin var framhaldandi samhaldsføst skilt á tann hátt, at tað framvegis ikki var ein treyt fyri at fáa útgjald, at móttakarin hevði rindað í grunnin.

Ein (helst ótilætlað) avleiðing av broytingini var, at persónar, sum høvdu havt rætt til fult útgjald, um løgtingslógin ikki varð broytt, mistu part av útgjaldinum, teir høvdu havt eftir gomlu skipanini, um hesir við útgjald ikki høvdu havt bústað í Føroyum í minst 40 ár, meðan teir vóru millum 15 og 67 ár. Hendan broytingin rakti tó ikki persónar, sum longu fingu úr grunninum. Avleiðingin av broytingini gjørdist harvið bæði tilvildarlig og órættvís.

Dømir:

- Persónur hevur búð í Føroyum í 2 ár, tá hann í 2008 gerst 67 ár. Av tí at viðkomandi longu fær úr grunninum, tá broytingin kemur í gildi 1. juli 2009, hevur hann framhaldandi rætt til fult útgjald, hóast hann bara hevur búð í Føroyum 2 ár.
- Persónur hevur búð í Føroyum í 47 ár, herav 30 ár meðan hann var millum 15 og 67 ár. Men hann hevur, vegna lesnað og arbeiði, búð uttanlands í 20 ár. Viðkomandi verður 67 ár í 2010. Orsakað av broytingini, hevur hann bert rætt til 30/40 (75%) av fullum útgjaldi, tá hann gerst 67 ár.

Um broytingin ikki varð framd, høvdu báðir persónar havt rætt til fullan Samhaldsfasta, um teir búðu í Føroyum, tá eftirlønin fór í útgjald.

Bæði tað, at eftirlønin er samhaldsføst, har rætturin til útgjaldi ikki er treytaður av inngjaldi, og almennu viðmerkingarnar til uppskotið tala fyri, at tað var av misgáum, at uppskotið eisini kom at fevna um persónar, sum høvdu havt rætt til fult útgjald, um løgtingslógin ikki var broytt.

Undir avleiðingar í lógaruppskotinum (løgtingsmál 87/2008) stendur:

**"Fíggjarligar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar/felagsskapir:** Uppskotið fær fíggjarligar avleiðingar fyri fólk, sum hava búð í Føroyum í minst 3 ár, tá tey vóru millum 15 og 67 ár, tí nú verður útgjaldið úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum víðkað til hesi fólk.

**Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar/felagsskapir:**
Uppskotið fær fíggjarligar avleiðingar fyri fólk, sum hava búð í Føroyum í minst 3 ár, tá tey vóru millum 15 og 67 ár, tí nú verður útgjaldið úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum víðkað til hesi fólk."

Hinvegin stendur einki undir avleiðingar um, at uppskotið eisini fær fíggjarligar og sosialar avleiðingar fyri persónar, sum kanska longu frá byrjan av hava rindað í grunnin, um hesir ikki hava búð í Føroyum í 40 ár - meðan teir vóru millum 15 og 67 ár - tá eftirlønin fer í útgjald.

So avleiðingin var helst ikki tilætlað.

Tí verður í hesum lógaruppskotinum mælt til eina skiftisreglu, sum tekur atlit til teir persónar, ið høvdu havt rætt til fult gjald úr grunninum, um fortreytirnar fyri útgjaldi ikki vórðu broyttar frá 1. juli 2009. Ásetingin leggur upp til, at broskipanin, t.v.s. avmarkingin hjá persónum, ið hava búð í Føroyum styttri enn 40 ár, meðan teir vóru millum 15 og 67 ár, í minst møguligan mun rakar persónar, ið høvdu havt rætt til fult útgjald úr grunninum eftir gomlu skipanini. Tó verður krav sett um, at viðkomandi hevur nátt pensjónsaldur, hevur havt bústað í Føroyum í minst 10 ár, tá arbeiðsmarknaðareftirlønin fer í útgjald, og ikki hevur fingið játtað frítøku eftir § 2. Stk. 7 (Sum er broyting nr. 3 í hesum uppskotinum).

### 1.3.3. Undantak vegna Norðurlendska sáttmálan um sosiala trygging

Fyri at tryggja samsvar við Norðurlendska Sáttmálan verður skotið upp at seta inn í lógina, at persónar, ið eru fevndir av sáttmálanum, kunnu søkja um at verða frítiknir at rinda til Samhaldsfasta. Hesir skulu sostatt ikki rinda ásetta prosentpartin av skattskyldugu inntøkuni til Samhaldsfasta eins og aðrir skattgjaldarar undir 67 ár.

Fyri at umganga at hesir persónar vinna rætt til pensjón bæði í Føroyum og uttanlands, men bara rinda fyri sosiala trygging uttanlands, verður mælt til at áseta, at tíðarskeið við frítøku ikki telja við í upptjening av Samhaldsfasta. Tað vil siga, at tá gerast skal upp við pensjónsaldur, hvussu nógv hesir persónar skulu hava í útgjaldið úr Samhaldsfasta, verða árini við frítøku drigin frá.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Samanumtikið hevur uppskotið við sær:

- At inngjaldið hækkar stigvíst við 0,25% árliga, úr núverandi 2,25% upp 3% frá 2020.
- At mánaðarliga útgjaldið til hvønn pensjónist verður umleið 1.600 kr. størri í 2020 enn í 2017.
- At pensjónsaldurin í Samhaldsfasta av sær sjálvum fer at verða samsvarandi við fólkapensjónsaldurin.
- At tað fyri øll, sum eru búsitandi í Føroyum, verður samsvar millum rætt til fólkapensjón og rætt til útgjald úr Samhaldsfasta.
- At persónar, ið eru sosialt tryggjaðir uttanlands sambært Nordisk Konvention om Sosial Sikring, kunnu verða frítiknir at rinda til Samhaldsfasta ávíst tíðarskeið, og forvinna harvið ikki rætt til útgjald úr Samhaldsfasta í sama tíðarskeiði.
- At tey sum vóru rakt av broytingunum í 2009, undir ávísum treytum, fáa rætt til fullan Samhaldsfasta.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Umframt at uppskotið verður lagt til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya Landsstýri, verður uppskotið eisini sent beinleiðis til eina røð av hoyringspørtum. Fyri eitt samlað yvirlit yvir hoyringspartar verður víst til Fylgiskriv 2 “Trygg og varandi pensjónskipan”.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar bæði fyri landið og fyri kommunurnar. Talan er um bæði jaligar og neiligar avleiðingar.

Hækkingin í inngjaldinum hevur við sær, at landið og kommunurnar sum arbeiðsgevarar koma at rinda eitt hægri gjald til Samhaldsfasta. Talan verður um eina eykaútreiðslu á 0,75% av samlaðu lønargjaldingunum frá 2020.

Hinvegin hevur økta inngjaldið við sær størri útgjald til pensjónistarnar. Útgjald úr Samhaldsfasta er skattskyldug inntøka, og tað hevur við sær meiri inntøkur í landsskatti og kommunuskatti.

**Fíggjarlig ávirkan á landskassan**

Roknað verður við meirinntøkum til landskassan á 1 mió. kr. í 2018. Arbeiðsgevaragjaldið økist 2 mió. kr., men hinvegin vaksa skattainntøkurnar við 3 mió. kr.

| *Mió. kr.* | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** | **2028** | **2029** | **2030** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Landsskattur | 3 | 12 | 18 | 18 | 18 | 19 | 19 | 19 | 20 | 20 | 21 | 21 | 21 |
| Arbeiðsgevaragjald | -2 | -9 | -14 | -14 | -14 | -14 | -14 | -14 | -14 | -14 | -14 | -14 | -14 |
| **Tilsamans** | **1** | **2** | **4** | **4** | **4** | **5** | **5** | **5** | **6** | **6** | **7** | **7** | **7** |

Sum frálíður verður talan um størri upphædd. Bæði tí at inngjaldið hækkar og tí at talið av pensjónistum økist. Roknað verður við 4-7 mió. kr. árini frá 2020 til 2030.

**Fíggjarlig ávirkan á kommunurnar**

Roknað verður við meirinntøkum til kommunurnar á 2 mió. kr. í 2018. Arbeiðsgevaragjaldið økist knappar 4 mió. kr., men hinvegin vaksa skattainntøkurnar góðari 1 mió. kr.

Sum frálíður verður talan um størri upphædd. Bæði tí at inngjaldið hækkar og tí at talið av pensjónistum økist. Roknað verður við 14-19 mió. kr. árini frá 2020 til 2030.

| *Mió. kr.* | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** | **2028** | **2029** | **2030** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 4 | 15 | 22 | 23 | 23 | 24 | 25 | 24 | 25 | 26 | 26 | 27 | 26 |
| Arbeiðsgevaragjald | -1 | -5 | -8 | -8 | -8 | -8 | -8 | -8 | -8 | -8 | -8 | -8 | -8 |
| **Tilsamans** | **2** | **10** | **14** | **15** | **15** | **16** | **17** | **16** | **17** | **18** | **18** | **19** | **18** |

Fyri samlaðu fíggjarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar av pensjónsnýskipanini verður víst til hjálagda fylgiskjal 2. “Trygg og varandi pensjónsnýskipan”.

**Fíggjarligar avleiðingar fyri skattgjaldarar**
Persónar undir 67 ár, sum búgva í Føroyum – og útlendingar, sum arbeiða í Føroyum – rinda til Samhaldsfasta eftir skattskyldugu inntøkuni. Tað vil siga, at persónar rinda til Samhaldsfasta eftir sama skattagrundarlag, sum teir rinda landsskatt og kommunuskatt. Tó er ongin botnfrádráttur í skattskyldugu inntøkuni fyri gjaldinum til Samhaldsfasta. Gjaldið er 2,25% í 2017. Eftir hesum uppskotinum hækkar gjaldið til 2,5% frá 1. juli 2018, 2,75% í 2019 og 3% frá og við 2020.

Tað hevur við sær, at persónar koma at rinda 0,75% meira av skattskyldugu inntøkuni frá og við 2020. Tað vil siga, at persónur við inntøku á 50 tús. kr. kemur at rinda 31 kr. meira um mánaðin. Persónur við inntøku á 300 tús. kr. kemur at rinda 188 kr. meira um mánaðin. Fyri mánaðarligu ávirkanina á aðrar inntøkubólkar víst til talvuna niðanfyri

| **Hækking í inngjaldið til Samhaldsfasta. Mánaðarlig ávirkan á ymiskar inntøkubólkar.** | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ***Ársinntøka*** | ***50.000*** | ***100.000*** | ***200.000*** | ***300.000*** | ***500.000*** | ***750.000*** | ***1.000.000*** |
| Ávirkan pr. mð í 2018 | 10 | 21 | 42 | 63 | 104 | 156 | 208 |
| Ávirkan pr. mð í 2019 | 10 | 21 | 42 | 63 | 104 | 156 | 208 |
| Ávirkan pr. mð í 2020 | 10 | 21 | 42 | 63 | 104 | 156 | 208 |
| **Tilsamans pr. mð** | **31** | **63** | **125** | **188** | **313** | **469** | **625** |

Sera umráðandi er í hesum sambandi at gera vart við, at tað í sambandi við pensjónsnýskipanina eisini verður skotið upp at lækka bundna inngjaldið til egna pensjón úr 15% og niður í 12%. Tað vil siga, at hóast uppskotið – isolerað sæð – hækkar skattin á allar inntøkur, so vilja broytingarnar – í síni heild – verða til fyrimun fyri lægru inntøkurnar.

**Fíggjarligar avleiðingar fyri Samhaldsfasta**
Roknað verður við, at hækkingin í inngjaldinum frá 2,25% í 2017 til 3% í 2020 hevur við sær at samlaðu inngjøldini í Samhaldsfasta hækkað úr 392 mió. kr. og upp í 522 mió. kr. Tað vil siga, samanlagt 130 mió. kr. árliga.

Samhaldsfasti ásetur útgjaldið til hvønn pensjónist útfrá hesum báðum fyritreytum:

1. At langtíðarhaldføri í grunninum verður tryggjað, og
2. útgjaldið til hvønn pensjónist kann javnast árliga við einum prosentið sum liggur nakað omanfyri prísvøksturin

Havandi í huga, at talið av pensjónistum er vaksandi og fer at vaksa munandi komandi 30 árini, hevur tað við sær, at grunnurin ikki kann rinda allar sínar árligu inntøkur útaftur um báðar fyritreytirnar omanfyri skulu halda. Arbeitt verður eftir eini langtíðarætlan har yvirskot skal verða í grunninum fram til umleið 2030. Síðani verður roknað við, at undirskot verður til umleið 2050, tá vøksurin í talinum av pensjónistum er hasaður av, og tað aftur verður yvirskot í grunninum. Fyri at kunna hava undirskot árini 2030-2050 má grunninum uppbyggja eina munandi eginogn fyri at tryggja gjaldføri hesi árini. Eginognin er í dag umleið 1,4 mia. kr.

So hóast hækkingin, sum sagt, hevur við sær eykainntøkur til Samhaldsfasta á 130 mió. kr., so verður roknað við, at útgjøldini bara kunnu hækkað við umleið 116 mió. kr. Hækkingin økir sostatt um yvirskotið í Samhaldsfasta við umleið 14 mió. kr. fyrstu árini, og grunnurin kann sostatt

uppbyggja sær ein uppaftur størri eginogn enn ætlað fram til 2030, og síðani hava størri undirskot árini 2030 til 2050.

Samanlagt kann tí sigast, at hækkingin ikki ávirkar fíggjarliga haldførið í Samhaldsfasta sum frálíður: yvirskotini verða størri fyrstu árini, men undirskotini samsvarandi størri seinni.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið, men ikki fyri kommunurnar.

Serliga ásetingin um, at inngjaldið í Samhaldsfasta hækkar 1. juli 2018 – tað vil siga, miðskeiðis í inntøkuárinum – kann gerast ein umsitingarlig avbjóðing fyri TAKS, sum krevur gjaldið inn. Avbjóðingin er viðvíkjandi tí partinum, sum persónar rinda. Persónar rinda av skattskyldugu inntøkuni, og tað kann gerast ein avbjóðing, at 2 ymisk inngjaldsprosent eru galdandi í sama inntøkuárið.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri allar arbeiðsgevarar sum rinda út løn. Mett verður, at hækkingin í arbeiðsgevaragjaldinum verður 60 mió. kr. árliga frá 2020. Av hesum koma landið og kommunurnar at rinda 22 mió. kr. Restin, 38 mió. kr., verður sostatt rinda av øðrum arbeiðsgevarum, sum fyri tað mesta eru vinnuligir.

Fyri hvønn einstakan vinnuligan arbeiðsgevara verður talan um, at gjaldið hækkar við 0,25% av samlaðu lønargjaldingunum, hvørt árið, komandi trý árini. Tað vil siga samanlagt 0,75% frá og við 2020. Arbeiðsgevari við lønargjaldingum á 1 mió. kr. kemur sostatt at rinda 7.500 kr. meira árliga frá 2020. Arbeiðsgevari við lønargjaldingum á 10 mió. kr. kemur at rinda 75.000 kr. meira, o.s.fr.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri øll sum eru, ella koma í fólkapensjónaldur. Hesi fáa hægri útgjald úr Samhaldsfasta.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur við sær, at lógin um Samhaldsfasta verður í tráð við Norðurlendska Sáttmálan um Sosiala Trygging (Nordisk Konvention om Social Sikring).

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur við sær, at lógin um Samhaldsfasta verður í tráð við Norðurlendska Sáttmálan um Sosiala Trygging (Nordisk Konvention om Social Sikring).

**2.9. Marknaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Sum greitt frá omanfyri, so verður skotið upp at hækkað gjaldið, sum persónar og arbeiðsgevarar rinda til Samhaldsfasta.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki fólkið skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greina

**Til § 1, nr. 1**
Ásett verður hvat inngjaldsprosentið skal verða komandi árini. Núverandi inngjald í 2017 er 2,25%. Gjaldið verður rindað bæði av persónum og arbeiðsgevarum. Persónar rinda árliga 2,25% av skattskyldugu inntøkuni og arbeiðsgevarar rinda 2,25% av útgoldnum A-inntøkum.

Skotið verður upp, at inngjaldið hækkar soleiðis, at tað frá 1. juli 2018 verður 2,5%, frá 1. januar 2019 verður 2,75%, og frá 1. januar 2020 verður 3%.

**Til § 1, nr. 2**
Ásett verður at persónar, sum hava nátt pensjónsaldri sambært lóg um almannapensjónir rinda onki í grunnin. Í galdandi lóg stendur persónar 67 ár ella eldri.

Hetta er fyri at tryggja, at vanliga aldursmarkið fyri at fáa úr grunninum er tað sama sum aldursmarkið fyri at sleppa frá at rinda inn í grunnin.

**Til § 1, nr. 3**
Fyri at tryggja samsvar við Norðurlendska Sáttmálan um Sosiala Trygging (Nordisk Konvention om Social Sikring) verður skotið upp at seta inn í lógina, at persónar, ið eru fevndir av sáttmálanum, kunnu søkja um at verða frítiknir at rinda til Samhaldsfasta. Hesir skulu sostatt ikki rinda ásetta prosentpartin av skattskyldugu inntøkuni til grunnin.

**Til § 1, nr. 4**
Aldursmarkið fyri at fáa úr grunninum verður sett at verða ájavnt við fólkapensjónsaldurin sambært lóg um almannapensjónir o.a. Endamálið er at tryggja, at tað altíð er samsvar millum pensjónsaldurin í fólkapensjónini og pensjónsaldurin í grunninum.

Harumframt verður ásett, at fyri persónar sum eru búsitandi í Føroyum við pensjónsaldur, telja ár teir hava búð í Grønlandi og Danmark við, tá rætturin til útgjald úr grunninum verður uppgjørt.

Frammanundan taldu einans ár við bústað í Føroyum við. Tó var eitt undantak fyri sjómenn, sum búðu í Føroyum, men av arbeiðsávum vóru skrásettir í fólkayvirlitinum í Grønlandi.

**Til § 1, nr. 5**
Ásetingin verður broytt í samsvar við nýggju ásetingarnar í broyting nr. 4. Harumframt verður ásett, at áramál við frítøku sambært nýggju ásetingunum í broyting nr. 3 verða ikki tald við tá rætturin til útgjald úr grunninum verður gjørdur upp.

**Til § 1, nr. 6**
Aldursmarkið fyri at fáa úr grunninum verður sett at verða ájavnt við fólkapensjónsaldurin sambært lóg um almannapensjónir o.a.

**Til § 1, nr. 7**
Ásetingin tekur atlit til teir persónar, ið høvdu havt rætt til fult gjald úr grunninum, um fortreytirnar fyri útgjaldi ikki vórðu broyttar frá 1. juli 2009. Ásetingin leggur upp til, at brøkskipanin, t.v.s.

avmarkingin hjá persónum, ið hava búð í Føroyum styttri enn 40 ár, meðan teir vóru millum 15 og 67 ár, í minst møguligan mun rakar persónar, ið høvdu rætt til fult útgjald úr grunninum eftir gomlu skipanini. Tó verður krav sett um, at viðkomandi hevur nátt pensjónsaldur, hevur havt bústað í Føroyum í minst 10 ár, tá arbeiðsmarknaðareftirlønin fer í útgjald, og ikki hevur fingið játtað frítøku eftir § 2, stk. 7.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, dd. november 2017

**Kristina Háfoss**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Fylgiskjøl, sum ikki fáa lógargildi:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: “Trygg og varandi pensjónskipan”

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 153 frá 23. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 2.** Fæ grunsins verður fingið til vega við, at allir persónar árliga rinda grunninum ein prosentpart av teirri inntøkuni, sum myndar grundarlagið undir skattaútrokningini, og allir arbeiðsgevarar árliga rinda grunninum ein prosentpart av útgoldnum A-inntøkum. Fyri persónar og arbeiðsgevarar er ásetti prosentparturin 2,25%. | **1.** Í § 2, stk. 1 verður 2. pkt. orðað soleiðis: ”Fyri persónar og arbeiðsgevarar er ásetti prosentparturin:<br>1) 2,50% frá 1. juli 2018,<br>2) 2,75% í 2019 og<br>3) 3,00% í 2020 og fylgjandi ár.” |
| *Stk. 2.* Persónar, sum eru 67 ár ella eldri, og persónar, sum ikki arbeiða í Føroyum og sum búgva uttanlands, rinda einki í grunnin. Arbeiðsgevarar, sum eru 67 ár ella eldri og hava fólk í vinnu, rinda tó árliga ein prosentpart av útgoldnum A-inntøkum. Arbeiðsgevarar rinda ikki gjald fyri løn hjá útlendingum undir FAS skipanini, ella fyri løn hjá útlendingum umborð á skipum, sum eftir § 2, stk. 1, litra j, 2. pkt. í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, við seinni broytingum, verða javnmett við skip, ið eru skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum, um tey vóru føroysk, lúka treytirnar í § 1, stk. 1 í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá. Ásetti prosentparturin er 2,25%. | **2.** § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis: “*Stk. 2.* Persónar, sum hava nátt pensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir rinda onki í grunnin. Arbeiðsgevarar, sum hava nátt pensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir og hava fólk í vinnu, rinda tó av útgoldnum A-inntøkum. Arbeiðsgevarar rinda ikki gjald fyri løn hjá útlendingum undir FAS-skipanini.” |
| *Stk. 6-8.* (Strikað). | **3.** Í § 2 verður sum stk. 7 sett: “*Stk. 7.* Persónar, sum eru fevndir av Nordisk Konvention om Social Sikring, kunnu eftir umsókn verða frítiknir at rinda í grunnin. Umsóknin, sum skal latast TAKS, er galdandi frá móttøkudegnum at rokna.” |

| | |
|---|---|
| **§ 3.** Rætt til arbeiðsmarknaðareftirløn eigur hvør persónur, ið hevur fylt 67 ár, og sum í minst trý ár, meðan hann var millum 15 og 67 ára gamal, tá hevði fastan bústað í Føroyum og var skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum.Kravið um skráseting í fólkayvirlitinum í Føroyum er ikki galdandi fyri sjómenn, sum búgva í Føroyum, men av arbeiðsávum eru skrásettir í fólkayvirlitinum í Grønlandi. | **4.** § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:<br>"Rætt til arbeiðsmarknaðareftirløn eigur hvør persónur, ið hevur rætt til fólkapensjón sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., um viðkomandi í minst trý ár at rokna frá 15 ára aldri og fram til pensjónsaldur hevur havt fastan bústað í Føroyum og í sama tíðarskeiði hevur verið skrásettur í Fólkayvirlitinum í Føroyum. Bústaður í Danmark ella Grønlandi og skráseting í Fólkayvirlitinum har gevur sama rætt til útgjald, sum ásett í 1. pkt., um viðkomandi við útgjald býr í Føroyum." |
| *Stk. 2.* Persónur, sum lýkur krøvini í stk. 1, hevur rætt til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt árið, tó í mesta lagi 40 ár, hann hevur havt fastan bústað í Føroyum og verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum, meðan hann var millum 15 og 67 ára gamal. | **5.** § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Persónur hevur rætt til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt ár, viðkomandi lýkur krøvini í stk. 1, tó í mesta lagi 40 ár. Ár við frítøku eftir § 2, stk. 7 verða ikki tald við." |
| *Stk. 3.* Rætturin tekur við hin fyrsta í mánaðinum, ið viðkomandi hevur fylt 67 ár. Rætturin heldur uppat við endan av mánaðinum, tá treytirnar eru burtur. | **6.** Í § 3, stk. 3 verður 1. Pkt. orðað soleiðis:<br>"Rætturin tekur við hin fyrsta í mánaðinum, ið viðkomandi hevur rætt til fólkapensjón sbrt. lóg um almannapensjónir." |
| | **7.** Í § 3 verður sum stk. 4 sett:<br>"*Stk. 4.* Ásetingin í stk. 2 er ikki galdandi fyri persónar, sum búðu í Føroyum tann 1. juli 2009, so leingi hesir persónar búgva í Føroyum. 1. pkt. er treytað av, at móttakarin:<br>1) hevur nátt pensjónsaldur,<br>2) hevur havt bústað í Føroyum í minst 10 ár, tá arbeiðsmarknaðareftirlønin fer í útgjald, og<br>3) ikki hevur fingið játtað frítøku eftir § 2, stk. 7." |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2018. |